# BØNARLØTAN

**NOVEMBER** **2023** **38. árg.**

## *1. Mikudagur* — *1. Sám. 20. 23-43*



**MEKSIKO, Mixtec, Oaxaca**
**Inga McKendry**
Takkið Gudi, at vit eru liðug at endurskoða Matt. Ein umsetingarráðgevi kannar tað fyri okkum. Nú arbeiða vit við at gera stutt skriftbrot klár at geva út. Sue fær framvegis viðgerð í USA.

**DANMARK, Kolding**
**Anne og Jan Zachariassen**
Fleiri enn 70 luttakarar eru á bíbliuumsetingarskeiði á Zarepta 30. okt. - 4. nov. Takkið og biðið fyri teimum, og at Harrin framhaldandi signar arbeiðið, sum verður gjørt millum deyv kring heimin. Eg verði í Føroyum til 9. nov.

**KRINGVARPIÐ**
19. nov. kl. 16 sjónvarpsmøti, Betesda

**EVANGELISKA RØDDIN á Rás 2 (meir á www.evr.fo)**
Sunnukvøld kl. 21.00 .....Kelduvaðið (endursent hóskvøld kl. 21)
Týskvøld kl. 21.00 .......... Á torginum (endursent sunnud. kl. 12.30)

## *2. Hósdagur* — *Sálm 108*

**DANMARK, Kristnastova**
**Sólva og Jákup Hansen**
Vit eru í Føroyum 1-23. nov. Hesa tíðina verða Marin og Kári Østerø her í húsinum, og vit eru takksom!

**– Susan og Øssur Berghamar**

## *3. Fríggjadagur* — *Áp. 21. 1-17*

**SENEGAL, Tongia**
**Lív Poulsen**
3. nov. byrjar eftirkanningin av 1. Mós. og Dán. kap. 1-7. Biðið fyri okkum um vísdóm, styrki og heilsu, og at tað praktiska eisini gongur væl. Eftir hetta verður gjørt klárt til prentingar. Biðið fyri ferðingini hjá umsetingarráðgevanum.



**USA, New Tribes Mission, Alabama**
**Judy og Óli á Grømma Jacobsen**
1-6. nov. vitja vit samkomur og vinir í statinum Missouri, og 7-12. nov. hava vit altjóða nevndarfundir á venjingarskúlanum har. Vit fara eisini at fyrireika okkum til vitjanina í Filipsoyggjum 17. des. - 18. jan. 2024.

**DANMARK, Hirtshals, Malta**
**Ansa og Arnold Mortensen**

**Hirtshals, Malta**
**Anna og Hans Djurhuus**



Síðan vit góvust sum fyristøðuhjún á Malta í summar, hava vit verið nógv í Føroyum og vitjað, har Harrin letur dyr upp, bæði í Suðuroy og norðanfjørðs. Nú vit fara til Danmarkar, er møti í Aalborg 4. nov. Annars luttaka vit á møtunum á Malta og aðrastaðni í Jútlandi umframt at vitja á sjúkrahúsinum í Aalborg. Biðið, at Harrin leiðir okkum!

**FØROYAR**
**Unn og Jógvan Zachariassen**
**Billy Graham Evangelistic Association**

Vit høvdu møti í Essen í Týsklandi leygarkvøldið 7. okt. 7000 fólk komu, og 700 góvu sítt lív til Jesus. 4-5. nov. hava vit møtir í Róm, Italia, har vit vænta eini 20.000 fólk. Biðið, at Harrin kallar mong. Takk fyri forbønir fyri okkum sum familju. Vit hava tað øll gott, og børnini trívast væl. Hjørdis og Karita eru í Keypmannahavn og Jósef í Oslo.



**– Else og Poul Johan Djurhuus**
**– Anna Maria og Rógvi Joensen**
**– Khuldah og Sámal Mikkelsen, Josva 14, Ester 13, Samuel 9**
**– Dora og Niels Pauli Nónstein, Andreas 14, Kristina 12**
**– Synnøve og Danjal av Rana, Benjamin 14, Anna Emilie 8, Lukas 3**

## 5. Sunnudagur — Áp. 21. 18-40



**Elam Ministries, Evropa**
**Margretha Højgaard Poulsen**

5. nov er altjóða bønardagur fyri atsøktum kristnum. Sí www.elam.com/dayofprayer
Biðið fyri teimum, ið eru atsøkt fyri sína kristnu trúgv. Enska podvarpið *Jesus Speaks Farsi* við søgum og samrøðum fæst á www.elam.com/podcastUSA, Nebraska, Ethnos 360

**ÍSLAND, Reykjavík, Akurinn**
**Rósa og Jógvan Purkhús**
**Akureyri, Sjónarhæð, Ástjørn**

Biðið Harran signa tey, sum vilja fylgja Jesusi, eisini gentu og drong, ið vóru á síðstu ungdómslegu. Biðið, at vit fáa nóg nógv starvsfólk og børn næsta summar.

## 6. Mánadagur — 1. Sám. 22. 1-23v



**Rachel og Peter Hansen**

Stóra takk tit mongu, sum bóðu fyri mær, tá eg fekk bypass-skurðviðgerðina. Eg havi tað gott og eri liðugur við uppvenjingina. 6-10. november hevur altjóða nevndin hjá NTM fundir í Missouri, USA. Nógv er á skránni – biðið fyri fundunum.

**MEKSIKO, Michoacán, Puruandiro**
**Hansy og Martin Tuohy**
**Victoria 17, Emma Grace 15, Jónatan 14,**
**Markus 11, Evita 8, Joy 6**

Í nov. eru nógvar átrúnaðarligar veitslur, sum byrja við *Degi teirra deyðu*. So koma aðrir dagar, har ymisk halgimenni verða tilbiðin.

Hesar dagarnar eru kristin ofta undir trýsti frá familju um at luttaka. Biðið, at vit fáa høvi at boða evangeliið.

## *7. Týsdagur* *Áp. 22. 1-30*



**PAPUA NÝGUNEA**
**Lili og Brian Poulsen**
**Elliot 7, Jude 5, Evelyn 3, Olivia 0**

Pápi (Sonni) og Simon svágur komu at vitja okkum í PNG síðst í okt. og steðga í tríggjar vikur. Sonni fer eisini inn í mangseng ættarbólkin at vitja samkomuna, har hann virkaði í nógv ár. Simon fer at vitja lele ættarbólkin, har hann hevur virkað. Biðið, at Lili og eg framhaldandi finna okkara styrki í Gudi til at útinna verkið, Hann hevur lagt fyri okkum.

## *8. Mikudagur* *1. Sám. 23. 1-28*



**SENEGAL, Dakar**
**Marion og Hans Arni Jensen**
**Ryan 14**

Marion skal ferðast suðureftir í landinum at vegleiða tey, sum læra ættarbólkamál. Hon fer úr Dakar 8. nov. og kemur aftur 15. nov. Biðið um trygd, og at hon veitir dygga hjálp. Vit eru takksom fyri, at umsetingarskeiðið her í sept./okt. gekk væl, og at tey, sum luttóku, fingu nógv burturúr.

**OM, SUÐURAFRIKA, Mamelodi Aids Hope**
**Tanja og Kurt Abrahams**

## *9. Hósdagur* *Sálm. 109*

**FILIPSOYGGJAR, Nayba, NTM**
**Liz og Ragnar Niclasen.**

Vit lenda í Manila 9. nov., sum verður fyrsta ferðin saman til Filipsoyggjar síðan Covid-19. Sjálvur gjørdi eg tveir styttri túrar. Heilsan hjá Liz er nógv betur nú. Vit skulu gjøgnumganga tilfarið til Rómbrævið saman við brøðrunum Rogancio og Galahad og Pablito, mammubeiggja teirra. Teir eru sera virknir í samkomuni. Enn vanta um 42% av GT at verða umsett. Arbeiðsmenninir eru fáir, so biðið, at Harrin leggur systkjum á hjarta at vera við í hesum stóra tiltaki, sum helst er ein 8-10 ára verkætlan.

## *10. Fríggjadagur* *2. Pæt. 1. 1-21*



**PAPUA NÝGUINEA, Sorimi (fj.arb.)**
**Carol og Poul Joensen**
Vit luttaka á *miniReach* í Zarepta 10-12. nov.

**NTM - FØROYAR**
**Noomi og Eli Christiansen**
**Hadassa 12, Tabita 9, Debora 8, Natan 5**
*miniReach* er missiónsráðstevna f. yngra ættarliðið, sí www.ntm.fo

## *11. Leygardagur* *Ez. 7. 1-27*

**ONGLAND, Taunton, European Christian Mission**
**Dorit og Simon Marshall**
Meginpartin av nov. verður Simon heimanífrá, og eg verði við honum part av tíðini. Hann vitjar trúboðarar í Rumenia og Kekkia, og vit bæði fara til Bulgaria á samkomulegu uttan fyri Sofia, har Simon skal tala. Síðst í mánaðinum hava verjarnir hjá ECM árligu fundirnar, har Simon verður við. Biðið um vísdóm og Harrans

leiðslu í avgerðunum, sum skulu takast. Vit takka fyri ávøkst, og at fleiri eru, sum royna at náa evropearar.

**DANMARK**
**Glostrup Frikirke**

*Í dag fyllir Noah Elias Hansen 12 ár

## *12. Sunnudagur* *2. Pæt. 2. 1-22*

**FØROYAR**
**Birgit og Svenning av Lofti**
12-18. nov. vitjar Svenning í Suðuroynni, har hann saman við Sveini í Prestgarði hevur evangeliska fundarrøð í bygdarhúsinum í Lopra.

**Atlantic Mission, Juvel II**
Nú verður hugsað um, hvar okkara tænasta skal vera í 2024. Møguleikin at nýta Juvel II, áðrenn skipið fer til Grønlands, er okkum framvegis opin. Biðið um leiðslu Guds.



**– Rutt og John í Skemmuni**
**– Anna og Símun Pætur á Torkilsheyggi**
**– Vanja og Svein í Prestgarði, Svend 15, Terji 11, Petra 9**

## *13. Mánadagur* *Ez. 8. 1-18*

**FØROYAR**
**Shamila og Høgni Johannesen**
Vit eru heimkomin úr Pakistan eftir tríggjar sera gevandi mánaðir, har vit hava havt samband við nógvar samkomuleiðarar og kristnar felagsskapir fyri at fáa innlit í og skapa sambond, ið eru grundarlag

undir framtíðar missiónsarbeiði har. Komandi trý árini gera vit nakrar túrar til Pakistan árliga og gera restina av arbeiðnum á netinum, meðan vit eru heima í Føroyum.

**GRØNLAND, Qaqortoq**
**Marjun og Páll Poulsen**



Serstakliga eftir legurnar í summar hava tannáringar víst andaligan áhuga, hava sett spurningar og biðið um samtalu. Hetta er eitt verk, sum má gerast gjøgnum persónligar samtalur og arbeiði í minni bólkum. Tað hevði verið gott, um yngri kreftir komu at hjálpa í hesum sambandi - um enn bara í nakrar vikur.

## *14. Týsdagur* — *2. Pæt. 3. 1-18*

**GRØNLAND, Nuuk**
**Naalakkap Jiisusip Oqaluffa**
**Hans Sivertsen**



Biðið fyri samkomuni í Nuuk. Vit eru fá til allar tænastur. Biðið fyri leiðsluni, og at fleiri taka lut og bera Orðið fram.

**GRØNLAND, Qasigiannguit**
**Solveig og Daniel Kinda**

**ONGLAND, Cornwall**
**Anna og David Rodda**

## *15. Mikudagur* — *Ez. 9. 1-11*

**FILIPSOYGGJAR, Puerto Prinsessa**
**Cathy og Jógvan J. Rasmussen**

Vit verða í Filipsoyggjum frá miðjan nov. til miðjan des. Vit fara at arbeiða við tveimum ymiskum umsetingum.

**FØROYAR**
**– Elin og Jógvan Jacobsen**
**– Lis Zachariassen**
**– Annika og Poul Færø**
**– Anna og Óli Steinberg**
**– Maria og Jens Bech**



## *16. Hósdagur* *Sálm. 110 og 111*

**DANMARK, Skovlunde**
**Sara og Andrew Berghamar**
**Noah 17, Lydia 6**

Sara, Lydia og Andrew gleddust stórliga um ferðina í Føroyum 5-13. okt. Tey vóru við til Kristnastova 50 ára-dagin í Lívdini og høvdu samfelag bæði við samkomuna í Ebenezer og við góðar vinir og familju. Biðið, at vit duga at hjálpa teimum nýggju í okkara samkomu at kenna seg heima.



## *17. Fríggjadagur* *1. Jóh. 1. 1-10*

**DANMARK, Odense**
**Árni Helmsdal**

Føroysku møtini á Fyn byrjaðu í 1984. Biðið fyri fyrireikingunum til 40-ára haldið í mars 2024.

**ÍRLAND, Global Serve International**
**Guðrun og Ivor Tutty**

## 18. Leygardagur *Ez. 10. 1-22*

**SVEIS, Versoix, Redeemer Grace**
**Jeanette og Solomon Magura**
**Reuben 10, Micah 10**

Vit eru takksom, nú ein í samkomuni varð doyptur í sept. Nú eru um 30 børn í samkomuni – biðið, at vit fáa fleiri sunnudags-skúlalærarar.

## 19. Sunnudagur *1. Jóh. 2. 1-11*



**ONGLAND, Birmingham, OM**
**Claire og Craig Niclasen**
**Elizabeth 17, Rebekah 15, Lydia 13**

Venjingartiltøkini við Trans World Radio, OM og Stewardship gingu væl. Claire leggur til rættis *Mission Partners Network Forum*, sum verður í apríl 2024. Biðið, at nógv fólk frá ymsum trúboðanarfelagsskapum úr øllum Evropa luttaka, og at Gud gevur henni vísdóm at gera undirvísingartilfar.

**TURKALAND, Istanbul (f)**
**Annika og Stephen Everett**

## 20. Mánadagur *Ez. 11. 1-25*



**PAPUA NÝGUINEA, Kovol**
**Natalie og Philip Hansen**
**Louis 6, Timon 4**

Vit takka fyri ein gest, sum í næstan tvær vikur hjálpti Natalie at undirvísa Louis og øðrum, soleiðis at hon fekk ta hvílu, henni tørvaði, og eisini fær betri tíð at læra kovolmálið og vera

saman við fólkinum. Natalie gongur við tvíburum og ætlar at eiga í Týsklandi. Biðið fyri ferðini!

## *21. Týsdagur* *1. Jóh. 2. 12-29*



**FRANKARÍKI, Nantes, OM**
**Cecile og Jóhannis Mortensen**
**Sarah 13, Leah 9, Abigail 5**

Samkoman veksur! Nógv nýggj koma á møti eftir summarfrítíðina, so nógv er at gera, og okkum tørvar vísdóm til nýggjar avbjóðingar á leiðini. Biðið fyri børnunum, sum vóru á barnaleguni í Bretagne í okt., fyri barnaarbeiðnum í grannalagnum, fyri ungdómsarbeiðnum, fyri nýggja lærusveinabólkinum og fyri arbeiðnum at seta nýggja samkomu á stovn.

## *22. Mikudagur* *Ez. 12. 1-28*



**TÝSKLAND, Hückeswagen, Ethnos 360**
**Wina og Benjamin Hansen**
**Noah Elias 12**

Í nov. verða Ethnos 360 trúboðanarfundir í samkomu okkara í Týsklandi. Síðani hava vit *umsøkjaradag*, har vit møtast og hava samrøður við ung, ið hava søkt um at byrja í trúboðanartænastu uttan fyri Evropa í 1 ár. Eisini hava vit foreldradag seinni í mánaðinum fyri at stuðla og eggja foreldrum.

## *23. Hósdagur* *Sálm. 112 og 113*

**USA, North Carolina**
**Charlotte, Calvary Church**
**Gudny og John Munro**

Í samkomuni fyrireika vit tiltøkini, sum verða í sambandi við Thanksgiving síðst í nov. Tá eru fyrireikingarnar til jólini eisini væl ávegis, og tá koma serliga nógv fólk til møtini. Vit royna at røkka út á ymiskan hátt, til børn, ung, eldri, gomul, eins og vit hava eitt serligt tiltak fyri fólk við menningartarni.

## *24. Fríggjadagur* — *1. Jóh. 3. 1-24*



**PAPUA NÝGUINEA, Mengen**
**Annika og Simon Flanagan**
**Nya 15, Noah 14, Karis 10,**
**Judah 8, Ethan 6**
Biðið fyri samkomuni í Lele, har ósemja hevur tikið seg upp millum tvær høvuðsfamiljur. Biðið, at bíbliulærararnir fáa vísdóm at greiða fløkjuna, at Judah verður frískur í maganum, og at heilivágurin hjálpir. Takkið, at bæði Judah og Ethan tóku ímóti Kristusi sum sínum frelsara síðsta mánað.

## *25. Leygardagur* — *Ez. 13. 1-23*

**INDONESIA**
**Krissy og Daniel Hansen**
**Zephaniah 2, Selah Rose 0**
Vit vitja tveir ættarbólkar, annan síðst í okt. og hin síðst í nov. Biðið, at Gud vísir okkum, hvørjum av hesum vit skulu tæna. Vit fyrireika nú farloyvið, sum varar í 5 mánaðir. Vit ætla til Føroya í mars 2024.

## *26. Sunnudagur* — *1. Jóh. 4. 1-21*

**ITALIA, Molise**
**Heidi og Regin Guttesen**
**Trisha 11, Emma 7**



Í dag, 26. nov. verður ein ung genta doypt. Biðið fyri Seforu og fyri øllum teimum, sum koma til dópsmøtið, at Harrin brúkar hennara vitnisburð. Tað er altíð eggjandi fyri samkomuna, tá tað legst aftrat.

## *27. Mánadagur* *Ez. 14. 1-23*



**JAPAN**
**Shino og Hallur Mortensen**
**Kano 14, Nana 12, Louie 9, Rio 4**
Vit hava enskt-kafé annanhvønn leygardag, har vit royna at náa út til fólk, ið ikki eru trúgvandi. Biðið, at fólk koma til trúgv.

**VENESUELA, Puerto Ordaz**
**Nurimar og Jóhannus Frants Poulsen**

## *28. Týsdagur* *1. Jóh. 5. 1-21*

**TEILAND, Chiang Mai**
**Corine og Sørin Joensen**
**Aron 11, Noah Kristian 9**



Eitt bønarevni hevur leingi verið at fáa egnan bygning. Nú er ein møguleiki komin at byggja nærhendis Chiang Mai Theological Seminary. Enn hava vit ikki neyðugu fíggingina at keypa jørðina og byrja byggingina. Vit biða um vegleiðing hesum viðvíkjandi.

## OM, LOGOS HOPE, TeenStreet

Ellintur og Eyðgerð Abrahamsen komu heim í okt. eftir at hava verið umborð á Doulos Hope og Logos Hope í 6 mánaðir. Logos Hope er í Madagaskar og Doulos Hope í Tailandi. Biðið fyri øllum umborð og tænastunum hjá skipunum, og at gleðiboðskapurin um náði Guds røkkur út til tey vitjandi umborð. Biðið eisini fyri starvsfólkinum og nevndini hjá OM Føroyum, umframt Teen-Street-leiðsluni í Føroyum.



## FILIPSOYGGJAR, Naplud (f)
## Monika og Tim Sharp
## Hanna 15





Útgevari KBS (Kristniboðssambandið)
Blaðnevnd Róland í Skorini, ábyrgd, Ernst Olsen, Elsa í Skorini, Randi Østerø, Dóra D. Gaard, Kristianna J. Heinesen, Óli Jákup Jacobsen, Jónvør Christiansen, Durita Olsen, Barbara og Ragnar Vest, Hanna og Sigurð Ó. Vang.
Avgreiðsla Óla Hendrik av Fløtum, tel. 227057
Uppseting Grafikmaster, tel. 502022
Myndasavn info@grafikmaster.fo
Prent Føroyaprent, tel. 314555
Teldupostur prayerservicefo@gmail.com
Heimasíða www.kbs.fo

©KBS. Loyvt er at endurgeva tilfarið, um keldan verður nevnd.

## BÓKATÆNASTAN

Biðið fyri bókatænastuni hjá Leirkerinum og Logos Hope!

## NÝGGJ BÓK!

**248 síður 250 kr.**

*Harrin Jesus kemur aftur og kann koma í dag.*

Evangelisturin, rithøvundurin, blaðmaðurin og bíbliuútleggjarin Arno C. Gaebelein kunngjørdi í meira enn hálva øld profetisku sannleikarnar í Bíbliuni og livdi dagliga í teirri vón, at teir fóru at ganga út. Tænasta Gaebeleins fór tvørtur um aldamótið 19. og 20. øld og fevndi um tvey heimskríggj. Hann ivaðist ongantíð um týdningin av at granska profetorð til tess at vaksa andaliga og at skilja sínámillum ávirkanina av mentanarligum ruðuleika.




FORLAGIÐ LEIRKERIÐ

Bílegging á www.leirkerid.fo
Kráargøta 36 • Klaksvík
Tel. 718191 • leirkerid@leirkerid.fo